SUMMAR FESTIVALUR

# Vinnarar av myndakappingini



1

Expert · Tel 35 35 35 · www.expert.fo

## Summarfestivalurin 2007

Myndakappingin við heitinum **»Njót tónleikin við virðing fyri festivalinum«** er nú av og vinnararnir eru funnir.

**Vinnararnir eru hesir:**

1. **vinningur:** Maria Højgaard
2. **vinningur:** Kári Vitalis
3. **vinningur:** Súsanna Lydersen

**Vit ynskja vinnarunum hjartaliga tillukku!**



## Vinningar

1. **Digimax i50 myndatól**
   Samsung Digimax i50 digitalt myndatól við innbygdum MP3-spælara, tasku og 1 gb korti
2. **Samsung 800 myndatól**
   Digitalt myndatól við tasku og 1 gb korti
3. **Samsung 530 myndatól**
   Digitalt myndatól við tasku og 1 gb korti



2



3

Sosialurin · Sosialurin · Postboks 76 · FO-110 Tórshavn

expert – vit vita

MARKNAÐARRÁK

VIKA 38 2007

### PARTABRØV Á SAMA STIGI

Góða partabrævagongdin í farnu viku varð órógvað fríggjadagin, tá tíðindi bórust um at bretski tjóðbankin hevði hjálpt bankanum Nothern Rock, sum serliga tekst við bústaðarfígging, úr gjaldføristrupulleikum. Serliga fíggjarvinnan varð hart rakt av hesum. Um hugt verður at kursgongdini í ymsu vinnugreinunum í Evropa higartil í ár, so hevur ráevnisvinnan staðið seg best við eini hækking á 19%, meðan fíggjarvinnan hevur staðið seg vánaligast við einari lækking uppá 10%.

### BRETSKA PUNDIÐ LÆKKAÐI NÓGV

Pundið sum hevur verið undir stórum trýsti, er lækkað úr 10,94 niður í 10,72 av tíðindunum um Northern Rock. Hetta er tað lægsta síðan mai 2006. Pundið, sum annars hevur verið nokk so støðugt, lækkaði sostatt niður um ráklinjuna frá 2002 og kann halda áfram at lækka nakað aftrat.

### RENTURNAR ÓBROYTTAR.

10-ára lánsbrævarentan er ídag 4,28% sum er eitt vet hægri enn fyri viku síðan. Annars verður bíðað eftir úrslitunum frá rentufundinum og hvørjar viðmerkingar limirnir í FED fara at hava til førda pengapolitikkin.

### RENTUFUNDURIN AVGER GONGDINA

Størsta hendingin hesa vikuna sum kann ávirka marknaðirnar er rentufundurin hjá amerikanska tjóðbankanum í kvøld. Sum heild er nokk eingin ivi um at rentan verður lækkað, men spurningurin er heldur, hvørt tey lække hana við 0,25% ella 0,5%. Flestu vænta tó, at lækkingin einans verður 0,25%, tí ein størri lækking kann verða tulkað sum, at tjóðbankin heldur tað standa verri til í amerikanska búskapinum enn higartil mett. Tað kann gera størri skaða enn gagn.

Í hesi vikuni fara fýra stórir bankar at kunngera roknskap. Hetta er serliga áhugavert, tí útsøgnirnar í samband við kunngerðinar kunnu geva eina góða ábending um hvussu sokallaða sub-prime kreppan hevur ávirkað fíggjarvinnuna. Hetta kann fara at ávirka partabrævakursir sum framhaldandi kunnu væntast at vera óstøðugir komandi tíðina.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1406,99 | + 1,91% |
| Alheims partabrøv | 8348,66 | + 0,86% |
| Atlantic Petroleum | 1347,00 | + 13,29% |
| Føroya Banki | 221,00 | + 1,14% |
| Eik Banki | 662,00 | -0,90% |
| KB Trygg Eurostoxx | 108,72 | -0,24% |
| USD | 537,19 | -0,44% |
| JPY | 4,67 | -1,65% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK